| | | |
|---|---|---|
| **LD-Rundskriv** | Dato 1. oktober 1999 | Ár-nr. **1999-8** |
| Til **Stovnar hjá landinum** | LD j. nr. 8312-18-41/98 | Síða |
| Heiti **Rundskriv um sáttmálan við BLF** | | |

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið undirskrivaðu sáttmála um setanarviðurskifti, arbeiðstíð og løn 14. februar 1999. Høvuðsavtala varð eisini gjørd. Samráðingar vóru seinri um endaligu lønarhækkingina, og vórðu tær lidnar 23. juni 1999.

**1) Høvuðsavtala**

Í sambandi við at høvuðsavtala er gjørd, skal verða mint á, at verður høvuðsavtalan ella sáttmálin brotin, kann tað bera í sær, at álagt verður tí partinum, sum ger brotið, at gjalda hinum partinum eina samsýning. Dømir har stovnar kunnu bróta sáttmálan, eru tá ið starv verður skipað ella lýst leyst, tá ið setanarbræv verður skrivað og um ætlanin er at siga starvsfólk úr starvi. Tað er tí sera umráðandi at halda mannagongdir og tíðarásetingar í sáttmálanum.

**2) Nýggjur lønarstigi**

Nýggjur lønarstigi er eisini gjørdur, men øll flyta ikki sjálvvirkandi yvir á hann. Gamli stigin verður framvegis galdandi, tó við teimum tillagingum, at 1. mars 1999 fer føleikaviðbótin inn í grundlønina, og øll lønin, eisini reiðuviðbótin, gevur eftirløn.

**2.1) Nýggjar setanir**

Í grundregluni verða setanir eftir 1. mars 1999 gjørdar eftir nýggja lønar-stiganum. Ein BLF-ari við meira enn 3 ára lønaraldur (pr. 1. mars 1999), ið skiftir millum tveir stovnar hjá landinum, kann í nýggja starvinum halda áfram á gamla skalanum, um hann ynskir tað. Hetta er tó treytað av, at hann var løntur eftir gamla skalanum í tí starvi, hann fór úr.

**2.2) Umsókn um at flyta av gamla lønarstiganum á nýggja lønarstigan**

Í 1999 kunnu allir BLF'arar søkja um at flyta av gamla lønarstiganum á nýggja lønarstigan. Umsóknirnar verða gingnar á møti, um leiðslan metir, at pláss er fyri hesum á játtanini.

Eftir 1. januar 2000 skulu allar umsóknir um at flyta stiga verða játtaðar. – Tó verða skifti einans framd pr. 1. januar og 1. juli, og skal BLF'ari søkja um hetta 3 mánaðir frammanundan.

BLF'ari, sum er fluttur yvir á nýggja lønarstigan, kann ikki verða fluttur aftur á gamla lønarstigan.

**2.3) Tvungin flyting**

BLF'arar við lægri lønaraldri enn 3 ár, sum ikki eru fluttir yvir á nýggja lønarstigan í 1999, skulu frá 1. januar 2000 flyta yvir á nýggja lønarstigan, hóast teir ikki hava søkt.

Á gamla lønarstiganum verða framvegis líka nógv stig, men hann verður tó broyttur soleiðis, at talan verður um nettoløn + eftirlønargjald, ið arbeiðs-gevarin rindar.

**3) Eftirløn**

Fyri tey, sum halda fram á gamla lønarstiganum, verður eftirlønin broytt soleiðis:

Hin 1. mars 1999 gevur øll lønin eftirlønin. Løntakaraparturin av eftirlønargjaldinum verður 0%, meðan arbeiðsgevaraparturin verður 15%.

Á nýggja lønarstiganum verður eftirlønin soleiðis:

Hin 1. mars 1999 gevur øll lønin eftirløn, løntakaraparturin av eftirlønargjaldinum verður 0%, meðan arbeiðsgevaraparturin verður 13%

Hin 1. januar 2000 verður arbeiðsgevaraparturin 14%.

Hin 1. januar 2001 verður arbeiðsgevaraparturin 15%.

**4) Úrtíð og reiðuviðbót**

Fyri drúgt álagt úrtíðararbeiði er orðingin um "hóskandi samsýning eftir umsókn" strikað. Í staðin er henda orðing gjørd:

"Fyri drúgt álagt úrtíðararbeiði galda hesar reglur:

1. Úrtíðararbeiðið kann bara vera eftir vanliga arbeiðstíð.
2. Samsýning fyri drúgt úrtíðararbeiði verður einans veitt, um úrtíðararbeiðið er álagt og tímanýtslan er undir eftirliti.
3. Drúgt úrtíðararbeiðið skal verða gjørt upp einaferð um mánaðin, ella eftir avtalu, t.d. pr. ársfjórðing ella tá ið ein áløgd uppgáva er liðug.
4. Drúgt úrtíðararbeiðið skal sum meginregla verða frígingið. Eru tímarnir ikki frígingnir, tá ið næsti ársfjórðingurin er av, skulu teir verða útgoldnir. Í serligum førum, tá ið báðir partar eru samdir um tað, kunnu tímarnir verða fluttir, men tó ongantíð meiri enn 12 mánaðir.
5. Drúgt úrtíðararbeiði skal verða frígingið 1 til 1,5. Tímalønin fyri útgoldnar úrtíðartímar er 150% av tímalønini."

BLF'arar fáa framvegis reiðiviðbót. Reiðiviðbótin ber í sær, at samsýnt verður ikki fyri 35 teir fyrstu áløgdu úrtíðartímarnar ein ársfjórðing. Drúgt álagt úrtíðararbeiði verður samsýnt, tá ið arbeitt er minst 45 álagdar úrtíðartímar um ársfjórðingin. Samsýnt verður frá 36. tíma.

Tað verður ikki rindað eftirlønargjald av úrtíðarsamsýning.

**5) Serfrøðingar og deildarleiðarar**

Serstøk greining og vegleiðing verður gjørd um hesar bólkar sbrt. avtalu millum BLF og Lønardeildina. Til greiningin og vegleiðingin eru gjørdar, mugu serfrøðingastørv og deildarleiðarar, ikki verða lýst ella sett, uttan so, tað í hvørjum einstøkum frammanundan er gjørd serstøk avtala millum BLF og Lønardeildina um flokking.

**6) Innplaseringar**

Stigini 1-6 eru til 3 ára útbúgvingar (t.d. bacelorar). Hesar vóru ikki í gamla sáttmálanum.

Stigini 2-7 eru til 4 ára útbúgvingar (t.d. Cand.Negot).

BLF'arar á 1. stigi á gamla lønarstiganum fyri 4 ára útb. flyta á 2. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 2. stigi á gamla lønarstiganum fyri 4 ára útb. flyta á 3. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 3. stigi á gamla lønarstiganum fyri 4 ára útb. flyta á 4. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 4. stigi á gamla lønarstiganum fyri 4 ára útb. flyta á 5. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 5. stigi á gamla lønarstiganum fyri 4 ára útb. flyta á 6. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 6. Stigi og hægri á gamla lønarstiganum fyri 4 ára útb. flyta á 7. stig á nýggja stiganum.

Stigini 3-8 eru til 5 ára útbúgvingar (vanligar universitetsútbúgvingar).

BLF'arar á 1. stigi á gamla lønarstiganum fyri 5 ára útb. flyta á 3. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 3. stigi á gamla lønarstiganum fyri 5 ára útb. flyta á 4. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 4. stigi á gamla lønarstiganum fyri 5 ára útb. flyta á 5. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 5. stigi á gamla lønarstiganum fyri 5 ára útb. flyta á 6. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 6. stigi á gamla lønarstiganum fyri 5 ára útb. flyta á 7. stig á nýggja stiganum.

BLF'arar á 7. – 15. stigi á gamla lønarstiganum fyri 5 ára útb. flyta á 8. stig á nýggja stiganum.

**7) Annað**

Ivaspurningar um sáttmálan, skulu stovnar leggja fyri Fíggjarmálastýrið, Lønardeildina.

Høvuðsavtalan, sáttmálin og lønartalvurnar liggja á heimasíðuni hjá Lønardeildini.

**8) Úr gildi**

Rundskriv um sáttmálan við BLF, LD-Rundskriv nr. 1999-6, verður sett úr gildi.

**Fíggjarmálastýrið, Lønardeildin 1. oktober 1999**

**L.v.**

**Thomas Magnussen**